

# Visti ikki hon var við barn

Danska kvinnan, Nana Sørensen, hevði verið plágað av veikari pínu í eina tíð, men hon hevði als ikki hugsað um, at hon kanska var við barn, tá hon beint fyri midnátt tollaksmessudag púra óvæntað føddi eitt vælskapt barn á stovugólvi sínum í eini íbúð í Keypmannahavn. Nana hevði ikki havt mánasjúku seinastu níggju mánaðirnar. – Læknin helt, at pínan kom av strongd, tí eg hevði havt so nógv um oyruni í seinastuni. Tá hon føddi dreingin, lá hann fyrst stillur, og hon bar ótta fyri, at hann var deyður. – Men so gav hann nøkur ljóð frá sær, og eg ringdi eftir sjúkrabili, sigur Nana, sum býr saman við Martini, sum tó ikki var heima, tá hon føddi dreingin. Dagarnar eftir føðingina, skuldu Nana og hitt nýfødda barnið vera á Ríkissjúkrahúsinum. – Nú skulu vit eisini venja okkum til at vera foreldur, sigur Nana og heldur, at tað nústaðni er gingið upp fyri henni, at hon er vorðin mamma.




*Enn hava Føroyar bara fingi ein part av bíløgdu nøgdini av koppingarevninum. Sjálvt um sjúkan nú tykist vera hasað av, fangar borðið*

# Brenna inni við heilivági

**Føroyar bíløgdu koppingarevni móti HINI-sjúkuni til triðingin av fólkinum, men langt frá so nógv verður brúkt. Vit sleppa tó ikki undan at keypa bíløgdu nøgdina, sjálvt um sjúkan nú tykist hasa av**

HINI
*Randi Jacobsen*
*randi@sosialurin.fo*

Eins og hini Norðurlondini koma Føroyar at brenna inni við eini stórari nøgd av HINI-heilivági.

Tá ið sjúkan fór at gera um seg í vár og avgjørt var at fara undir at koppseta fólk, skuldu heilsumyndugleikarnir í hvørjum landi taka støðu til, hvussu stóran part av fólkinum tey skuldu bíleggja heilivág til.

Svøríki og Noreg valdu at keypa heilivág til alt fólkið, men Føroyar eins og Danmark, Grønland og Ísland bíløgdu heilivág til 30 prosent av fólkinum.

Tað er her sum í Danmark, at vit koma at brenna inni við nógvum heilivági, sigur Heri Mørkøre, landsapotekari.

Higartil hava Føroyar fingið 9.000 skamtir, og brúktar eru nakað yvir 3.000.

Tað kemur nógv meira heilivágur til landið, tí Føroyar hava sum nevnt bundið seg til at keypa til 30 prosent av fólkinum.

Heilivágurin kemur í smáum nøgdum til landið, so hvørt sum hann verður framleiddur.

### Kendu ikki útlitini

Tað er altíð lætt at vera eftirklók, men í mai mánaði var ikki lætt at vita, hvørjum vit stóðu yvir fyri. Vit valdu tíbetur bara at keypa heilivág til ein part av fólkinum, men tað kundi havt verið ein skeiv avgerð, sigur Heri Mørkøre, sum leggur aftrat, at tey ráðførdu seg við allar møguligar serfrøðingar, áðrenn avgerðin var tikin.

Nú verður sagt, at sjúkan er við at hasa av, men framvegis verða fólk koppsett.

Tað hevur ikki gingið nógv væl at fáa starvsfólkini í heilsuverkinum at lata seg koppseta, sigur William Smith, smittuverjifrøðingur á Landssjúkrahúsinum.

Tey hava mælt øllum til at koppseta, og regluliga verða starvfólkini mint á, nær hetta kann gerast.

Aftaná nýggjár verður ein ætlan løgd um at geva ymsum lyklapersónum í landinum tilboðið um at lata seg koppseta. Tað eru øll tey, sum syrgja fyri, at samfelagshjólini mala, eitt nú løgtingslimir, samferðslufólk, fólk í ruskskipanunum o.o.



## P/F Fiskaaling søkir eftir stjóra

Fiskaaling vil ganga á odda í granskingar- og menningarvirksemi innan alivinnuna í Føroyum, og vil byggja upp eina granskingarstøð á altjóða støði. Felagið skal skapa karmar um hetta virksemið og skapa møguleikar fyri at fáa eina tilgongd av skikkaðum granskarum, sum kunnu útbyggja og víðka vitanarstøðið undir fiskaaling í Føroyum.

Felagið skal í størri mun enn nú samstarva við granskingarumhvørvið í Føroyum og grannalondum okkara og taka lut í felags verkætlanum. Eisini er ætlanin, at felagið í ein vaksandi mun skal virka sum tænastuveitari og ráðgevari til alivinnuna, innan økir har tílíkar tænastur ikki eru í Føroyum.

At miðla vitan og úrslit frá granskingar- og menningaarvirkseminum til vinnuna og almenningin og at veita ráðgeving eru týðandi arbeiðsuppgávur hjá Fiskaaling. Ein onnur týðandi uppgáva er at arbeiða víðari við menning av marinum fiskasløgum.

**Førleikar**
- tú hevur viðkomandi útbúgving
- tú hevur góð leiðslu- og samstarvsevni
- tú ert nýhugsin og ágrýtin
- tú hevur kunnleika til gransking og vinnulív
- tú dugur at samskifta á enskum

**Setanarviðurskifti**
Starvið verður sett skjótast gjørligt, men vit hava møguleika at bíða nakað eftir rætta viðkomandi. Lønin verður ásett eftir nærri avtalu og í mun til útbúgving og starvsroyndir.

Arbeiðsstaðið er á høvuðsskrivstovuni hjá Fiskaaling við Áir. Meira fæst at vita við at venda sær til Ingolf Joensen, fráfarandi stjóra á 21 47 47 ella Sigurð Ó. Vang, nevndarformann á 28 10 90 (eftir kl. 16).

Umsókn við avritum og møguligum ummælum, skulu sendast til:

**SPEKT**
Staravegur 17, Postsmoga 3258
FO-110 Tórshavn

Umsóknin skal vera komin fram í seinasta lagi 20. januar 2010 kl. 12. Allar umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði.

Fiskaaling
Aquaculture Research Station of the Faroes

P/F Fiskaaling er partafelag, har Føroya Landsstýri eigur allan partapeningin. Fiskaaling hevur virksemi við Áir, í Nesvík og í Skopun. Samlaða starvsfólkatalið er umleið 20, herav fleiri granskarar. Virksemi fevnir um at granska, menna og ráðgeva innan aling av vatnlivandi djórum og plantum og innan biotøkni, herundir verkætlanir innan matvørugóðsku, aliumhvørvi, fóður, vatn, framleiðsluhættir, nýggj aliøkir, aling á harðbalnum økjum v.m. Meiri fæst at vita á www.fiskaaling.fo

P/F Fiskaaling | Við Áir | www.fiskaaling.fo

www.sosialurin.fo
www.sosialurin.fo